# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Fyri 35 árum síðan:

## Styrimenn og skipsførarar í 1970



27. oktober í 1970 tóku 18 stýrimenn og skipsførarar prógv á Føroya Sjómansskúla.

Aftara rað f.v.: Páll Weihe, Selatrað, stýrimaður, Annfinnur Jacobsen, Hvalvík, stýrimaður, Edward Nicodemussen, Sandur, stýrimaður, Kaj Tausen, Hov, stýrimaður, Heðin Sevdal, Leirvík, stýrimaður, Jónsvein Michelsen, Mykines, stýrimaður, Árni Holm, Porkeri, stýrimaður, Eyðfinnur Stórá, Skopun, stýrimaður, Mortan Johannesen, Tórshavn, skipsførari, Jóannes Jørgensen, Sørvágur, skipsførari, og Sigurbjørn Niclasen, Tvøroyri, stýrimaður.

Fremra rað f.v.: Andrew Christiansen, Tórshavn, stýrimaður, Arnold Eyvindson, Hvalba, stýrimaður, Guttormur Christiansen, Vestmanna, stýrimaður, Álvur Holm, Hvalba, stýrimaður, Helgi Joensen, Toftir, stýrimaður, Páll Joensen, Tórshavn, stýrimaður, og Dánjal Frederiksberg, Strendur, stýrimaður

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1970*




Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin

"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo

i

Sosialurin

✝

## Andlát og jarðarferðir

**Leif Lamhauge,** í Dalinum, Lamba, búsitandi í Havn, andaðist í heiminum 30. oktober, 79 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin klokkan 13.

Tey, ið vilja minnast Leif, kunnu lata Føroya Felag Móti Krabbameini eina gávu. Konto í peningastovninum.

**Frits Witt** í Miðvági andaðist leygarnáttina, 75 ára gamal.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Danjal Sjúður Ennistíg,** Klaksvík, andaðist sunnudagin 30. oktober, 49 ára gamal.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

Mikudagin 26. oktober andaðist **Jóhan Poulsen**, Innan Glyvur, búsitandi í Melbourne Australia, 74 ára gamal.

✝

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Leif Lamhauge**

í Dalinum, Lamba
búsitandi í Tórshavn

andaðist í heiminum sunnudagin 30. oktober 79 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Sanna**
**Sigrun, Marjun, Sigurd og Margit**

*Tey, ið ynskja at minnast Leif, kunnu lata Føroya Felag móti Krabbameini eina gávu, konta í peningastovunum.*

**Dagurin í morgin**

**1. november. Alla halganna dagur.** Longu í aðru øld var siður at halda minningardagur hjá hvørjum einstøkum blóðvitni á deyðadegnum, men umleið ár 350 varð samtykt at halda minningardag fyri øll ein dag í árinum, og var hann fyrsta sunnudag eftir hvítusunnu. Pavin Gregorius III ásetti í 731, at dagurin skuldi verða hildin 1. november. Hann varð róptur *Festum omnium sanctorum*, hátíðardagurin hjá øllum teimum heilagu. Eftir trúbótina varð hann avtikin sum fastur halgidagur og varð í kirkjuárinum ásettur til fyrsta suunudag eftir fyrsta november, men 1. november varð standandi eftir í álmanakkanum. Løgtingið samtykti í 1949, at 1. november skuldi verða hildin sum *minningardagur teirra sjólátnu.*